# Miðlamjarr

NIKE = Just do it
EIK = Don't do it
***Maður, 45 ár***

**LAGT TIL RÆTTIS:** Eydna Skaale / Inna Törnroos



Um the answer is blowing in the wind hendan dagin rokni eg við at tað í dag er í ein sunnan frá Suðuroynni ...
***Kvinna, 30 ár***

*» Eg veit væl hvussu statsministarin eitur í Danmark; eg minnist bara ikki navnið á honum*

Pardise Amalie í nýggju sendingini á Tv3 »Amalies Verden«





*Sæð í ljósinum av fíggjarkreppuni – og so frameftir, so er tað klárt, at vit hava verið ov váðafús, tað mugu vit erkenna.*

Marner Jacobsen, fyrrverandi stjóri í Eik

*» Dómarar hava, eins og leikarar, tørv á hvíld*

Lassin Isaksen um stóra trotið á fótbóltsdómarum í Føroyum

Daman stóð nú vid einari uppskrift, men ivaðist í hvat tað var at 'blanchere rødbeder'. Tað tók mær bara eitt lítið google'blik at finna fram til svarið á heimasíðuni, ið øll konufólk burdu skrivað sær aftanfyri køkurulluna :)
***Maður, 26 ár***

*» So vilt tú spara nakrar hundrað krónur, næstu ferð tú keypur innbúgv til húsið, ella okkurt heilt annað, so spyr um tú kann fáa »ein góðan prís«*

Leif Láadal í greinini "Pruttið um prísin for hundan" á Kramm.





*Føroyingar blíva við at spyrja um hatta. Men eg havi nakað at siga øllum føroyingum: eg eri komin yvir tað nú*

Anna Faroe skemtandi um at verða blakað úr X-factor kappingini

*» Tað, at tað er so stutt tíð til at taka nakrar øgiliga stórar avgerðir, minnir øgiliga nógv um hendingarnar í oktober 1992. Munurin er, at tá vórðu føroyskir politikarar kallaðir niður at fundast við donsku stjórnina. Hesuferð er tað bara Fíggjareftirlitið, sum er uppi og snakkar við ein banka.*

Ronnie Thomassen, samfelagsfrøðingur

*» Eg taldi sekundini í høvdinum, og tá eg kom til ein minutt, var tað yvirstaðið*

Kendra Wilkinson, fyrrverandi dama hjá Playboy grundaranum Hugh Hefner, um fyrstu ferð tey vóru í song saman

Pappírsleysa vesið er nærri enn hitt pappírsleysa samfelagið, segði ein maður...
***Maður, 50 ár***